## Skrivstovu-/Teknistovuhølir

Góð og ljós skrivstovuhølir/teknistovuhølir til leigu.

Talan er um 150 m$^2$ í einari hædd við fundarhøli, skrivstovum, køki og tveimum toilettum. Góð parkeringspláss.

Nærri upplýsingar á tlf. 311139 og 315380 ella 311071.

**Mentamálastýrið**
**mentamáladeildin**

# Ph. D.-lestur í námsfrøði

Mentamálastýrið bjóðar við hesum einum áhugaðum við útbúgving frá hægri lærustovni, sum undirvísir ella hevur undirvíst á miðnámsútbúgving ella hægri útbúgving, at søkja Mentamálastýrið um lestrarstuðul. Stuðulin verður latin í trý ár soleiðis: 2001: í mesta lagi kr.100.000, 2002: í mesta lagi kr. 150.000 og 2003: í mesta lagi kr.150.000. Hetta merkir, at tann, ið fær stuðulin frá Mentamálastýrinum, eigur at útvegaða írestandi fígging frá viðkomandi fíggingarstovnum, eitt nú frá Granskingarráðnum. Vegleiðandi kann vera nevnt, at vanligt er, at Ph.D.-styrkhavi fær 80% av grundlønini á tí lønarstigi, viðkomandi er á, umframt ískoyti til ferðaútreiðslur sambært nærri avtalu. Lesturin verður lagdur til rættis í samstarvi millum Mentamálastýrið, Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúla og Dansk Institut for Gymnasiepædagogik, Syddansk Universitet (Odense), ið letur tænastur svarandi til eitt virði uppá kr. 100.000. Útbúgvingin kann byrja 1. august 2001.

Áhugað, sum hava í minsta lagi 3 ára undirvísingarroyndir í føstum starvi í miðnámsútbúgving ella hægri útbúgving eftir lokna námsfrøðiliga útbúgving, kunnu søkja um nevnda styrk. Eftir lokna Ph.D.-útbúgving hevur styrkhavin rætt at venda aftur til starv sítt, men ætlanin er annars, at viðkomandi skal virka í føroysku útbúgvingarskipanini, soleiðis at útbúgvingin í størst møguligan mun kemur øllum útbúgvingarverkinum til gagns.

Stuðulin verður lýstur við serligum atliti at námsfrøðiligum menningarvirksemi innan útbúgvingarverkið sum heild ella innan miðnámsútbúgvingarnar og hægri skúlaskap í Føroyum, alt eftir hvør verkætlan, ið talan verður um. Fakligi karmurin skal vera rúmur og fevna um námsfrøði sum heild við føroyskum sum faksertøkum øki.

Ph.D.-verkætlanin kann eitt nú fevna um:

a) ástøðiligar almennar námsfrøðiligar uppgávuorðingar við støði í tí serstøku málsligu støðu, sum føroyskir næmingar eru í og/ella
b) eina kanning av fakligum og námsfrøðiligum eyðkennum í pørtum av føroyska undirvísingarverkinum og/ella
c) ætlanir um, hvussu fakligt og námsfrøðiligt virksemi kann mennast innan útbúgvingarnar í Føroyum.

Umsókn skal fevna um eina fyribils lýsing av verkætlanini (umleið 2-3 A4 síður), CV umframt próvskjøl, herundir prógv fyri lidna námsfrøðiliga útbúgving, og skal vera Mentamálastýrinum í hendi 15. apríl 2001. Vísindaligar greinir v.m., sum umsøkjarin ynskir tiknar við í metingina, verða hjálagdar. Møguleiki er fyri at fáa leiðbeining til orðing av endaligari umsókn frá Mentamálastýrinum og umboði frá Syddansk Universitet um miðan apríl, og skal umsóknin vera Mentamálastýrinum í hendi 1. mai 2001.

Umsóknin verður viðgjørd av metingarnevnd, og játtan av umsókn er treytað av viðmæli frá Granskingarráðnum og góðkenning frá játtandi myndugleikum. Áhugað eru vælkomin at venda sær til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, í Mentamálastýrinum, telefonnr. 35 50 50 fyri at fáa fleiri upplýsingar um ætlanina.

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279, 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 – t-postur: mms@mms.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

**TK Stovan**

**Ring!**
**Vit koma**

**TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.**

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3136
**Navn:** P/F Áarberg
**Adressa:** 900 Vágur
**Kommuna:** Vágs Kommuna
**Stovningardato:** 09.03.2001
**Viðtøkudato:** 09.03.2001
**Kapitalur:** Kr. 2.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 2.000.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Sp/f North Atlantic Fish Export, 900 Vágur (Sp/f 2704)
**Nevnd:** Elsa Maria Olsen, 520 Leirvík (formaður), Jákup Olaf Olsen, Kielshusvej 2, DK-5250 Odensen SV og Eyðun Johannesen, 800 Tvøroyri.
**Stjórn:** Martin Karl Olsen, Blankagøta 12, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanni saman við einum stjóra, av tveimum nevndarlimum saman ella av allari nevndini.
**Grannskoðari:** : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 09.03.2001 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 12. marts 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3135
**Navn:** P/F Faroe Marine Products
**Adressa:** 520 Leirvík
**Kommuna:** Leirvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 01.03.2001
**Viðtøkudato:** 01.03.2001
**Kapitalur:** Kr. 4.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 4.000.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Laugafiskur HF, Ísland, Sp/F H. Konoy, 520 Leirvík (Sp/f 3115) og Fiskmiðlum Norðurlands HF, Ísland.
**Nevnd:** Luðvík Haraldsson, Skarðshlíð 11J, 603 Akureyri, Ísland (formaður), Jógvan á Húsamørk, 520 Leirvík, Hans Egil Olsen, Grannatún, 600 Saltangará, Adrian Dalsá, Grannatún, 600 Saltangará og Guðbrandur Sigurðsson, Aðalstræti 82, 600 Akureyri, Ísland.
**Stjórn:** Eirikur á Húsamørk, 520 Leirvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra ella av trimum nevndarlimum saman.
**Grannskoðari:** : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.03.2001 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskaframleiðslu og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 12. marts 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2704, **Sp/f North Atlantic Fish Export.**

**Viðtøkur broyttar:** 09.03.2001.
**Kapitalur:** Lækking við kr. 80.000,00 til kr. 0,00 til rindan av halli. Hækking við kr. 81.000,00 til kr. 81.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 81.000,00 til kurs 110
**Nevnd:**
Innkomin í nevndini: Elsa Maria Olsen, 520 Leirvík (formaður), Jákup Olaf Olsen, Kielshsvsvej 2, 5250 Odense SV, og Martin Karl Olsen, Blankagøta 12, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum, tveimum nevndarlimum ella av allari nevndini.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga partabrøv í øðrum feløgum, reka reiðaríivirksemi og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 12. mars 2001

Kristin Balle

---

**Í dag eru fylgjandi partafeløg undir tvingsilsavtøku strikaði úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1737, Sp/f Lindberg Djurhuus, 240 Skopun.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2422, Sp/f Óðin, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2675, Sp/f Jallur, 600 Saltangará.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2839, Sp/f 23.03.99, 530 Fuglafjørður

**Í dag eru niðanfyri standandi feløg í likvidation strikaði úr partafelagskránni:**

Skrásetingar-nr. P/F 234, P/F Sjúrður Strøm, 900 Vágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2613, Sp/f Lange Fashion, 620 Runavík.

Skráseting Føroya, tann 07.03.2001.

Kristin Balle

---



**Kirkjuliga Heimamissiónin**

# Forlagsleiðari

Til fulltíðarstarv hjá Heimamissiónini við ábyrgd fyri leiðslu og umsiting av forlagnum, søkja vit forlagsleiðara at byrja so skjótt sum til ber.

**Vit vænta, at tú**

- ert áhugaður fyri handilsskapi og marknaðarføring
- hevur leiðara- og samstarvsevni
- hevur innlit í roknskap og fíggjarligt skil
- ert virkisfúsur og framsíggin
- tekur undir við tí, sum HM stendur fyri andaliga og gudfrøðiliga

**Tú hevur ábyrgd fyri**

- dagligu leiðsluni og umsitingini av Heimamissiónsforlagnum
- at samskipa og standa fyri nýggjum útgávum hjá HMF
- fíggjarviðurskiftum og marknaðarføring
- bókaklubba, kundarøkt og søluneti
- avtalum við forløg, samprent, rithøvundar o.o.

**Fleiri upplýsingar:** Tom Skaale, aðalskrivari
tel. 422533 ella heima 318797
t-postur: ts@mission.fo

**Send umsókn til:** Kirkjuliga Heimamissiónin
Tom Skaale, aðalskr.
437 Nesvík

**Umsóknarfreist:** 22. mars 2001.

# Sig okkum frá



Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

# Hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir hjálparfólki til Ellis- og Umlættingarheimið at arbeiða 30 tímar um vikuna.

**Starvið**
fevnir um vanligt hjálparfólkaarbeiði og alt vanligt arbeiði á heiminum, t.d.eldrarøkt og reingerð.

Arbeiðið er skipað í vaktum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. apríl 2001. Løn sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 31 73 39.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 26. mars 2001.

S N A R S K I V A N

Vaskivognar | Kantinuvognar





Vit hava nógv ymisk snið av vaski- og kantinuvognum á goymslu. Vitja framsýningarhølið okkara ella ring og fá eitt prát við okkum. Vit senda sjálvandi katalog um alt landi.

**P/F Thomas Dam á Hálsi**
**Heykavegur 3 Tlf. 311400**




T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

# Umlættingarfamilja Fosturfamilja

Barnaverndin hjá Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir familjum úr Tórshavn, ið hava hug at gerast umlættingar- ella fosturfamiljur.

Ein familja er umlættingarfamilja, tá hendan átekur sær at hava barn/børn við serligum tørvi búgvandi í t.d. vikuskiftum ella ávíst dagatal í senn, alt eftir hvat avtalað verður. Hetta fyri at umlætta familjuna og kanska barnið við, og eisini verða umlætting hjá familjum við manglandi trygdarneti.

Ein familja er fosturfamilja, tá hendan átekur sær at hava barn/børn við serligum tørvi búgvandi hjá sær í styttri ella longri tíð.

**Sum umlættingar-/fosturfamilja fáa tit:**

- spennandi og mennandi arbeiði, sum tíðum kann verða kravmikið
- tætt samstarv við sosialu deild og stuðulsfólkaskipanina hjá kommununi
- skeiðvirksemi innan viðkomandi evnir
- samsýning

**Vit vænta av eini umlættingar-/fosturfamilju:**

- at hon er vælvirkandi
- at hon hevur stundir til børn
- at hon hevur gevandi samband við børn
- at hon er samstarvshugað mótvegis familjuni hjá barninum, barnaverndini og øðrum samstarvspørtum
- at hon er knýtt at einum bólki av fosturfamiljum, sum hittast av og á

Um tit hava áhuga og ynskja at fáa meira at vita, kunnu tit venda tykkum til Onnu Mariu Troest, sosialu deild, tlf. 31 51 60.

Umsóknirnar skulu stílast til barnaverndarnevndina hjá Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn.

S N A R S K I V A N